# órshavnar kommunu




*Ein av pápunum hjá piltunum segði at HB stuðlar góvu piltunum pening til ferðina, um teir ruddaðu í Hoyvíkini. Páparnir lótu væl at umhvørvisdegnum. Serliga væl dámdu teir økið, sum teir høvdu fingið, Gamla Hoyvíkin er eitt pragtfullt stað at ganga.*

## Næstan øll 500 trøðini vórðu latin



*Nógv fólk var á Skálatrøð og fekk sær plantupakkar frá Tórshavnar kommunu. Ikki minni enn 482 pakkar vóru latnir. Hetta hóast verðrið var stak keðiligt. Býargartnarin, Tóri í Hoyvík var stak væl nøgdur, og helt at hetta riggaði væl, at hava tiltakið saman við umhvørvisdøgunum.*



*Býargartnarin segði, at næsta ár áttu tey gera tiltakið enn størri. Eisini forkvinnan í Heilsu- og Umhvørvisnevndini, Elin Lindenskov var væl nøgd. Afturat plantupakkunum, høvdu fólk eisini møguleika at koma við greinum, og fáa flis heim við.*




*300 sekkir av flisi vóru latnir, sumt var av greinum, sum fólk høvdu við. Men kommunan hevði somuleiðis tikið eina bingju av greinum oman á Skálatrøð.*



*Hundalortaposarnir gingu sum heitt breyð á Skálatrøð. Fólk sum høvdu hund, fingu sær posar, og tey sum ongan hund høvdu fingu sær posar til grannan ella onkran annan.*

## Umhvørvisgongutúrur



*Sunnudagurin var triðji umhvørvisdagurin og hendan dagin varð tað fólkaheilsan sum var í fokus, Sosialurin varð við á Umhvørvisgongutúri av Krossinum til Kirkjubøar. Veðrið var av tí besta. Fleiri barnafamiljur vóru við og tilsamans vóru 32 gongufólk. Túrurin gjørdist ein frálík uppliving.*



*Ferðaleiðari var Ingigerð á Trøðni, á vegnum greiddi frá um slit á gøtunum. Regni fer illa við gøtuni, og onkustaðni var gøtan meira ein á enn ein gøta. Eisini er nógv slit av ferðsluni á gøtuni. Nógv fólk og hestar ferðast hendan vegin, og tað sæst.*



*Okkurt má gerast sambært Ingigerð, tí gøtan gerst alsamt verri. Til dømis kann man royna at føra vatnið burtur frá gøtuni, við at laða gøtuna við stórum gróti. Men til hetta krevst fíggjarlig orka.*

## Órudd í Tórshavnar havn



*Umhvørvisdagurin varð ikki einans hildin á landi, eisini framvið bryggjuni varð ruddað. Havnar froskmannafelag, savnaði upp í eina heila bingju av óruddi av havbotninum í Tórshavnar Havn.*



*Froskmenninir hildu at hetta var eitt gott tiltak. Ein teirra greiddi frá, at vanliga kavaðu teir bara í havnini tá teir leitaðu eftir horvnum fólki. Froskmenn kava vanliga ikki ørindaleysir í havnabasseng tí har er so skitið. Leggur man hondina á botnin stendur eitt rok av skitti frá. Men lív er enn í havnini. Hann hevði sæð bæði fisk og krabbar eisini heilt innið í Vágsbotni.*



*Við Reynsmúlalág hvíldi gongufólk i seg, og børnini spældu í ánnið sum einaferð varð ein gøta.*